# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Vaksandi áhugi fyri dansi

**Dansifrøi í Havn er felagið fyri tey, ið frøast um dans og fyri tey sum frøðast um dans**

DANSUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Henda seinasta veturin hevur Dansifrøi enn einaferð verið karmurin um virksemið hjá teimum, ið dáma væl at dansa. Og felagið er samstundis karmurin um virksemið hjá teimum, sum ynskja at læra seg at dansa.

Seinasta leygarkvøld varð tí skipað fyri eini avdansiveitslu á Føroya Studentaskúla í Hoydølum, har danskeiðið í vetur endaði. Her vóru dansaðir teir dansirnir, sum næmingarnir í samanlagt fimm liðum høvdu lært henda seinasta veturin.

Lærarar teirra hava verið Ruth og Jógvan Martin Mørk, Annelisa og Mads Winther, og Sharon Weiss við sínum tónleikarum.

Tað er eisini í Hoydølum, at Dansifrøi hevur hildið til tey seinastu mongu árini. Men vónað verður, at felagið í framtíðini kann fáa onnur og betri høli til virksemið.

Næsta tiltakið hjá Dansifrøi verður í Hoydølum tann 5. apríl, tá felagið fær vitjan av dansarum úr Hetlandi. Tá verður eisini skipað fyri felagsdansi og hugnakvøldi.

### Felagshús

Dansifrøi kann aftur í ár fegnast um ein vaksandi áhuga fyri dansiskeiðunum og teim tiltøkum, sum felagið annars skipar fyri gjøgnum árið.

Felagið hevur tó havt ein trupulleika, og tað eru hølisviðurskiftini. Men nú fer okkurt skjótt at henda, soleiðis at ein loysn kann finnast á hesum málinum.

Fyri tveimum árum síðani fór felagið í samstarv við Fimleikarfelagið Ljósið um bygging av einum felagshúsum í Gundadali. Skipast skuldi soleiðis fyri, at Ljósið kom at halda til í kjallaranum og Dansifrøi í ovaru hæddini.

Í samband við hetta málið hava bygginevndirnar hjá feløgunum fingið stóra hjálp, bæði frá starvsfólkum og býráðslimum í Havn. Og tey hava eisini fingið játtað bæði øki og stuðul til húsini fyri einum ári síðani.

Feløgini hava síðani søkt Mentamálaráðið um stuðul. Umsókn um stuðul varð send í mei mánaði í fjør, og tí bíða feløgini enn við spenningi eftir svarinum úr Mentamálaráðnum.

Í nevndini í felagnum sita nú: Formaðurin Erling Jørgensen, Sonja Mikkelsen, Andreas M. Andreasen, Sigrun Rubeksen og Sjúrður Rasmussen.



*Tey sita og hugna sær í hugnaligu café'ini við Norðskála, sum Fríða Midjord rekur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Vilja hava fleiri IN til kaffi

**Fleiri og fleiri vitja café'ina á Norðskála, usm nú økir um tilboðið til tey vitjandi**

MATSTOVUR
*Snorri Brend*

**Norðskáli:** Tað hevur verið langt til nærmastu matstovu í Sundalagnum. Men fyri tveimum árum síðani lat Café-IN upp á Norðskála við mattilboðum til allar aldursbólkar.

Í eina tíð hevur bert verið opið frá middagsleitinum og til kl. 23, men í hesi vikuni broyttist upplatingartíðin eitt sindur. Nú er opið frá kl. 10 á morgni til 23 á kvøldi.

Tey gera hetta fyri at kunna bjóða fólki inn at fáa sær ein kaffimunn um morgunin, har tey samstundis hava møguleika at keypa sær fransbreyð ella okkurt líknandi afturvið.

Hóast hesa øktu upplatingartíðina so fer Café-IN framvegis at bjóða fólki dagsins rætt og ein hóp av skundverðum.

### Ítróttur og føðingardagar

Henda café'in liggur á mangar mátar sera væl fyri og miðskeiðis í landslagnum.

Framvið Norðskála koyra í túsundatali av bilum hvønn einasta dag, og nógvir teirra leggja leiðina inn í matvøruhandilin í grannalagnum.

Nógv fólk leggja somuleiðis leiðina inn á café'ina til at keypa sær okkurt til matna ella okkurt drekkandi. Ein stórur partur av hesum eru havnarfólk, skilst.

Fleiri brúka hølini, tá konfirmatión, dópur, føðingardagur og aðrar hátíðarløtur eru á skránni. Og møguleiki er haraftrat fyri at fáa matin út av húsinum.

Tað er tó ein bólkur av fólki, sum hava fingið eyguni meiri og meiri upp fyri hesum staðnum. Tað eru ítróttarfólkini.

Tá tey eru afturkomin av dysti, m.a. í ítróttarhøllini á Eiði, leggja fleiri teirra leiðina inn higar fyri at fáa sær okkurt leskiligt at drekka, eitt gott prát, meðan tey lurta eftir ítróttartíðindunum í Útvarpinum. Tá hesi eru liðug fara tey víðari til heimbygdina.

Í løtuni fara fram ávegis umbyggingar inni í café'ini, og tá hesar eru lidnar, verður enn betri høvi at skipa café'ina í ymsar deildir.

Eitt ynski, sum nú eisini verður eftirlíkað, er ein stórskíggi. Nógv hava stóran áhuga í fótbólti, og í næsta mánaði fáa hesi eitt gott høvi til at síggja sítt lið spæla á stórskýggja, tá ein slíkur skýggi verður settur upp inni í matstovuni.

## Dagurin

**18. mars. Aleksander,** deyður umleið 250. Úr Aleksandriu og endaði sum biskupur í Jerúsalem. Fleiri ferðir varð hann atsøktur fyri trúgv sína, men komst undan og doyði ein natúrligan deyða, og varð *blóðvitni uttan blóð*, sum tikið varð til.

## Prógv

Símun Person Jacobsen, Tórshavn, hevur við Århus Universitet lokið guðfrøðiligt embætisprógv.

## Sangglað børn møtast í Fuglafirði



*Sangdagur Barnanna er vorðið eitt afturvendandi tiltak. Í ár verður Fuglafjørður karmur um tiltakið. Myndin er tikin frá Sangdegnum í fjør*

**Heimamissiónin skipar enn einaferð fyri Sangdegi Barnanna**

Dagurin 19. mars er dagurin, har øll barnakórini í Føroyum fáa møguleika at framføra og syngja saman við øðrum børnum um Jesus.

Dagurin byrjar í missiónshúsinum Thabor, og sum ein góður endabrestur verður konsert síðani hildin í Mentanarhúsinum. Konsertin byrjar kl 15.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í samband við dagin er løgd ein spennandi, men kortini strævin skrá fyri børnini. Tey koma fyrrapartin, og eftir at tey hava fingið ein drekkamunn verður andakt og felagssangur.

Tá klokkan er vorðin 10:30 skal felagskórið venja, og tað gera tey tann næsta tíman. Tá munnu nógv av børnunum vera svang aftur, tí tá skal matpakkin etast, áðrenn felagskórið aftur fer til venjingar kl. 12:30.

Eftir enn ein góðan drekkamunn byrjar so konsertin í Mentanar-húsinum, og varir hon í góðar tveir tímar, tá øll børnini fara hvør til sína bygd og bý.